# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggi »motorvegurin« til Europa

Leygardagin var enn ein varði laðaður í føroyskari sjóvinnusøgu, tá umboð fyri føroyskar og danskar myndugleikar umframt vinnuna í báðum londum hátíðarhalda nýggju rutuna millum Havnina og Esbjerg. Á bryggjuni í Esbjerg var nýggi motorvegurin úr Føroyum inn á europeiska meginlandið tikin í brúk. Smyril Line hevur broytt sína rutuætlan soleiðis, at Norrøna um vetrarhálvárið siglir uppá Esbjerg heldur enn til Hanstholm. Henda avgerð varð sum vera man eisini sera væl móttikin í størsta ídnaðar- og mentanarbýnum á vesturstrond Jútlands. Borgarstjórin segði í síni fagnaðarrøðu seg vóna, at henda nýggja farleið fer eisini at knýta vinarbond millum Esbjerg og Havnina. Eisini kom fram, at nýggja rutan fer at skapa nýggjar møguleikar fyri bæði ferðafólk og vinnu.

Smyril Line fer kortini ikki at sleppa Hanstholm. Summarmánaðirnar juni, juli og august fer framhaldandi at verða siglt til norðurjútska býin fyri at klára at halda ferðaætlanina.

At nýggja farleiðin til Esbjerg fer at hava stóran týdning fyri Smyril Line og Føroyar sum heild fekst tú eina greiða fatan av, tá ikki færri enn tríggir landsstýrismenn høvdu valt at brúka vikuskiftið til júst hesa hending. Uttanríkisráðharrin, vinnumálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin, sum stuðlaðu ætlanini hjá løgtinginum at seta pengar í Smyril Line, vórðu tilsteðar til hátíðarhaldið í Esbjerg. Vinnumálaráðharrin hevði so eisini sín lut í hesum tiltakinum, har hann í røðu bar fram góðynski til fyritøkuna í hennara royndum at byggja brýr millum Føroyar og meginlandið. Hann legði stóran dent á, hvussu týdningarmikið tað er fyri føroyingar og ikki minst vinnulívið, at tað eisini í framtíðini er sjóvegis samband millum Føroyar og meginlandið alt árið.

Tað var annars um reppið, at henda farleið glapp okkum av hondum. Um ikki landsstýrið og ein meiriluti av Føroya løgtingi tóku undir við at seta almennan partapening í Smyril Line, so høvdu vit mist meira enn 20 ára royndir og know how av ómetaliga stórum týdningi og virði. Norrøna hevði verið seld og alt virksemi hjá fyritøkuni varð farið fyri bakka með alla. Vit teljast ikki millum teirra, sum halda, at onnur kortini høvdu megnað at bygt hetta uppaftur á tað støði, sum Smyril Line í dag hevur ment seg til at vera á.

Nú mugu vit so bara hava álit á, at Smyril Line við teimum nýggju fólkunum, sum eru sett á stýra skútuni og halda henni á rættari kós, megna uppgávuna. Og vit loyva okkum so eisini at síggja fram til einaferð í framtíðini, at fyritøkan saman við myndugleikum her heima og úti kann fara undir aftur at sigla til Noregs og Skotlands kanska við øðrum skipi. Hetta er kanska ikki rætta tíðin til at tosa um slíkt, men tað er týdningarmikið at hava vissiónirnar livandi umframt at tryggja sær eitt haldgott og trygt grundarlag at standa á. Við núverandi konsepti skuldi borið til at hildið skútuni á kós – til frama fyri føroyska vinnu og føroyingar sum heild, her ikki minst til at fáa komandi ættarlið at kenna seg tættari knýtt at umheiminum og øvugt.

**Sosialurin**

# Nei Sjúrður, Eidesgaard og Hoydal mugu bjarga sær sjálvum



JASPUR VANG
Løgtingsmaður

**– teir liggja, so sum teir sjálvir hava reitt**

Landsstýrismálanevndin gjørdi samvitskufult tað, sum var rætt og rímiligt, hóast tað politiskt/taktiskt hevði loyst seg best fyri meg og Sambandsflokkin at virka fyri at drigið bæði Eidesgaard og Hoydal gjøgnum eina kanning av lásagøluni.

Fyri ikki at lata seg villleiða av orðsnildli í málinum um sonevndu "lásagøluna", er umráðandi, so sum eg vísti á í fyrra aftursvari mínum til Sjúrð Skaale, at skilja millum politik, løgfrøði og moral, og ikki, eins og Sjúrður, tvinna hesi hugtøk saman í ein politiskan vavgreyt.

### Samantvinnaði sannleiki Sjúrðar

Í aftursvari til mín í bløðunum finst Sjúrður Skaale at ásetingunum í Stýrisskipanarlógini um Landsstýrismálanevndina, sum hevur eftirlitið við, at landsstýrismenn og løgmaður útinna sítt starv á lógligan hátt. Sjúrður hevur tað fatan, at tað ikki er rætt og rímiligt, at Landsstýrismálanevndin er demokratiskt samansett, og soleiðis manna við tveimum samgongutinglimum og einum andstøðutinglimi, sum støðan er í løtuni. Tað er so politiska áskoðan Sjúrðar. Men uttan mun til ábreiðslurnar frá Sjúrði Skaale móti Ladnsstýrismálanevndini, skal verða sligið púra fast, at limirnir í - og løgfrøðiliga ráðgevingin hjá Landsstýrismálanevndini gjørdu eitt samvitskufult og politiskt óheft arbeiði, tá "lásagølan " varð viðgjørd.

Tilvitað ella ikki, so "gloymir" Sjúrður at greiða frá, at Landsstýrismálanevndin fyri so vítt er undir eftirliti av Føroya Løtingi, í og við at 2/5 av løgtingslimunum, t.v.s. ein lutfalsliga lítil minniluti, kann tilsíðisseta avgerðirnar hjá Landsstýrismálanevndini og heita á Løgtingsformannin um at seta kanningarstjóra. Henda møguleika, ella hesa minnilutavernd, hava Sjálvsstýrisflokkurin og Sjúrður Skaale troytt, men fingu teir eftir øllum at døma meira enn 3/5 av tinglimunum ímóti sær. Sostatt hevur demokratiið talað.

Harumframt "gloymir" Sjúrður at greiða frá, at tað stendur einum og hvørjum – eisini politikarum – frítt fyri at lata løgregluni fráboðanir um lógarbrot. Hettar sjávlsagt treytað av, at talan er um lógarbrot, sum verða átalað av tí almenna, ella í ávísum førum, at almenna átalan er treyta av kravi um átalu frá tí órættaða partinum.

Eg loyvi mær enn einaferð at vísa á, at tað kann tykjast sera undrunarvert, at partarnir í sonevndu "lásagøluni" ikki hava troytt hendan møguleikan, tá teir siga seg vera so sannførdar um, at eitthvørt ólógligt er farið fram.

Eisini "gloymir" Sjúrður at greiða frá, at tað ber til hjá einum og hvørjum – eisini politikarum - at stevna sivilrættarliga, eitt nú um talan er um ærumeiðing. Eisini her kann tað tykjast sera undrunarvert, at partar, sum sambart Sjúrði, í nevnda máli kenna seg alment ærumeiddar við baktalilsum og og lygnum, ikki stevna.

Bæði Landsstýrismálanevndin, nevndu 2/5 av løgtingslimunum í hesum føri, løgreglan og sivilrætturin viðgera ítøkilig lógarbrot. Hvat viðvíkur morali, poliskum lygnum, politiskum baktalilsum, følskum politiskum skuldsetingum og politiskari útspilling, sum Sjúrður samantvinnar við løgfrøði og moral, er tað, sum áður víst á, bert veljarin, sum kann døma politikararnar. Soleiðis er veruleikin.

### Politiskur taktikkur og loyalitetur

Sjúrður Skaale vil vera við, at er tað nakað, sum stýrir politikarum, so er tað floksloyalitetur. Samstundis leggur hann meg sum sambandsmann undir at vilja bjarga einum javnaðarmanni undan einari kanning. Hvussu hettar hongur saman er ilt at skilja.

Skuldi talan veri um floksloyalitet, hevði tað fyri Sambandsflokkin politikst/taktiskt uttan iva verið skilabest at drigið bæði Eidesgaard og Hoydal gjøgnum eina kanning av lásamálinum, og harvið drigið báðar floksformenninar gjøgnum tað negativu fjølmiðlaumrøðu, ein slík kanning hevði havt við sær. Eg eri onga løtu í iva um, at uttan mun til, hvørja niðurstøðu ein kanningarstjóri hevði komið til, høvdu politisku taparanir í einum slíkum máli verið teir báðir floksformenninir, sum "lásagølan" snýr seg um.

At tað harumframt hevði verið til stóran skaða fyri álitið á føroysku politisku skipanina, at hildið áfram at válka sær í hesum máli, er so ein onnur síða av sama máli.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.